Talvið hesa vikuna

Nýggi maðurin á føroyska talvfelagnum í Keypmannahavn, eitur Nicolaj Borge. Hann er altjóða meistari, og ger eitt come-back eftir nærum hálvtfjórða ára talvpausu. Men at enn knotur er í honum, prógvar hann sanniliga í sínum fyrsta talvi fyri nýggja felag sítt

Torben Sørensen 2323 — IM Nicolaj Borge 2406
2 div. (1.umfar), 17.11.2002

(Viðmerkingar: Eyðun Nolsøe og Carl Eli N. Samuelsen)

1.Rif3 Rif6 2.c4 g6 3.g3 Bg7 4.Bg2 0-0 5.Ric3 d6 6.0-0 e5 7.d3 Bd7 8.Rb1 Fc8 9.Re1 Bh3 10.Bh1 h6 11.b4 Ribd7 (hetta er mangan spælt fyrr - stødan er jøvn) 12.a4 Re8 13.Rid2 Rif8 14.a5 Rb8 15.c5 [15.b5 er møguligt, og eisini eitt vet betri] 15...dxc5 16.bxc5 Rie6 17.c6 b6 18.Ric4 Ric5 19.Ba3 Bf8 20.Rib5 bxa5 21.Fd2 a6 22.Ria7 Ff5 23.Rxb8 Rxb8 24.Fxa5 Rig4! 25.f3 [25.Bxc5 Rb5! 26.Rixb5 Bxc5 27.Bf3 Bxf2+ 28.Kh1 axb5 29.Rib2 Rie3 — stórur svartur fyrimunur] Rixd3! (avgerandi leikur, sum er ómetaliga ringur at finna á borðinum) 26.exd3 Fxd3 27.Bxf8 Rb1! (enn ein superleikur, sum gevur tvungið mát!)

28.Bc5 Ff1!+ 29.Rxf1 Rxf1 mát 0-1

Liðkappingin av bakkastokki

Hvalvíkingar sigraðu í fyrsta umfarinum á Havnini og hava saman við Klaksvíkini lagt seg á odda í liðkappingini

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Eitt óvæntað og tvey nøkunlunda væntað úrslit í 1. deild. Soleiðis kann ein tulka fyrsta umfar í bestu deildini í Føroyum, sum bleiv leikt um vikuskiftið.

Taka vit fyrst óvæntaða úrslitið, so er eingin ivi um at hvalvíkingar framdu stórt bragd við at vinna 3-1 á havnarmonnum. Ikki tí, vit kenna hvalvíkingar sum sera støðugir við nærum somu manning seinastu tíggju árini. Ein tílíkur stórsigur kemur allarhelst sera væl við hjá Brekká & co.

Havnarmenn, sum høvdu sterkari lið á pappírinum, fingu bert tveir javnleikir suður við aftur úr Hvalvík. Martin Poulsen og Herluf Hansen leiktu javnt móti ávíkavist Martin Brekká og Sámal Christiansen, meðan Finnbjørn Zachariassen og Gunnar Joensen vunnu hvør síni talv móti Olaf Berg og Andrias Ziska.

Bogi Ziska aftur á toftaliðnum

Í fjør flutti einstaklingaføroyameistarin frá 1987, Bogi Ziska, heimaaftur á klettarnar. Framanundan hevði hann verið fastur stuðul í mong ár hjá Talvfelagnum Føroyum í Keypmannahavn. Fyrstu — og seinastu ferð teir av Toftum gjørdist føroyameistarar, varð í 1987. Tá mannaði Bogi nevnliga fyrsta borðið á liðnum.

Martin Brekká og liðfelagarnir úr Sundalagnum vunnu ein óvæntaðan sigur á Havnini í fyrsta umfarinum, nú liðkappingin í talvi fór av bakkastokki

Sunnudagin hittu toftamenn klaksvíkingar í Klaksvík. Úrslitið bleiv 2,5-1,5 til heimaliðið. Bogi leikti varið við hvíta fólkinum móti Ólavi Simonsen. Ólavur fekk ikki tað stóra burturúr vápninum hjá sær, Chigorin byrjanin, og hóast sterki klaksvíkingurin bæði treiskaðist og offraði finnur fyri spæl, leikti Bogi neyvt og fekk sín javnleik.

Jens Kristian Hansen, sum nú eftir mong ár á fyrsta borði, mannaði annað borð, vann við svarta fólkinum á Rana Nolsøe. Rani lat finnu við tí huga at fáa gott spæl. Men heldur hinvegin fekk Jens Kristian so líðandi fyrimun av hesum, og vann trygt.

Á triðja borði vann Tummas M. Anthoniussen á Wenzil Højgaard, tá hesin tapti uppá tíð. Ingolf Gaard vann somuleiðis fyri klaksvíkingar á fjórða borði. Mótstøðumaðurin var super-veteranurin Justines Hansen.

Torbjørn vorðin kollfirðingur aftur

Vestmenningarga hava í ár mist eitt gott trumfkort. Torbjørn Thomsen hevur valt at venda aftur til sítt gamla felag, og hetta má smakka væl í munninum hjá kollfirðingum. Teir hava nevnliga ikki verið í oddastríðnum seinastu árini, og við Hans Kristian Simonsen og Torbjørn Thomsen á liðnum, er møguleiki fyri onkrum nevniverdum í ár. Í fyrsta umfarinum hittu kollfirðingar júst vestmenningar.

Hans Kristian og IM John Rødgaard leiktu javnt á fyrsta borði, somuleiðis sum Torbjørn og John Jacobsen býttu stigini á øðrum borði.

Evnaríki unglingurin Eyðálvur Johannesen, sum vónandi tekur telvingina uppaftur av álvara, vann á vestmenninginum Kára Durhuus, men Jákup á Rógvu Andreasen bjargaði vestmenningum javnleikin við sigri á Grettir Djurhuus. Eitt úrslit bæði liðini ikki heilt kunnu vera ónøgd við.

Stórsigur til Talvfelagið Føroyar

Føroyska útisetaliðið í Keypmannahavn fekk eina flúgvandi byrjan í næstfremstu deildini í Danmark. Liðið vann sunnudagin 6-2 móti sterkum liði ("Skakspilleren"), og fáur hevði væntað somikið gott úrslit framanundan. Rating viðvíkjandi vóru liðini sera jøvn, har føroyska liðið kanska hevði lítlan munin.

Tveir danir leika við Talvfelagnum Føroyar í ár. IM Nicolaj Borge, sum mannar fyrsta borð frammanfyri John Arna Nilssen. Hin nevnist Finn Nøhr, sum leikti á sjeynda borði frammanfyri Terja Petersen. IM Borge er kendur sum ein sera evnaríkur telvari, men legði telvingina at kalla á hilluna fyri góðum trimum árum síðani. Onkursvegna hevur hann tó hildið telvingina við lika, tí hann vann eitt ómetaliga vakurt talv við svarta fólkinum móti einum 2300-manni.

Hinir sum vunnu vórðu; John Arni Nilssen, Eyðun Nolsøe og Carl Eli Nolsøe Samuelsen. Heini Olsen, Heini Danielsen, Finn Nøhr og Terji Petersen leiktu javnt. Felags fyri dystin kann sigast at eingin á føroyska liðnum stóð nakrantíð verri, og sigurin kundi enntá verði enn størri. Lyklaorðið hendan dagin var kollektiv góð telving.

Málið - sum er uppflyting - er als ikki veruleikafjart. Tað prógvaðu føroysku útisetarnir í vikuskiftinum.

Einkultúrslit — 1. umfar

1. deild

KT — VT 2-2
Hans K. Simonsen — IM Rødgaard 0,5-0,5
Torbjørn Thomsen — John Jacobsen 0,5-0,5
Eyðálvur Johannesen — Kári Durhuus 1-0
Grettir Djurhuus — Jákup Andreasen 0-1

KTF — TT 2,5 — 1,5
Ólavur Simonsen — Bogi Ziska 0,5-0,5
Rani Nolsøe — Jens K. Hansen 0-1
Tummas M. Anths. — Wenzil Højgaard 1-0
Ingolf Gaard — Jústines Hansen 1-0

TFS — HT 3-1
Martin Brekká — Martin Poulsen 0,5-0,5
Finnbjørn Zachariasen — Olaf Berg 1-0
Sámal Christiansen — Herluf Hansen 0,5-0,5
Gunnar Joensen — Andrias Ziska 1-0

2. deild

VT — ST 3-1
Jón - Torkil Nielsen 0-1
Jákup Durhuus — Bernard Augustinusen 1-0
Palli Johannesen — Sonni Nielsen 1-0
Ingolf Debes — Jónfinn Thomsen 1-0

HT2-HT3 2-2
Haldur S. Johansen - Súni Ziska 0,5-0,5
Johan E. Hansen - Sigurð Justinussen 0-1
Óli Joensen - Jón Andreasen 0,5-0,5
Poul Poulsen - Ronny í Lon 1-0

RT-KTF2 3-1
Jógvan Næs - Rani Baldursson 0,5-0,5
Bjarki Ziska - Vagn Heldarskarð 1-0
Brandur Jacobsen — Finn Egilsson 0,5-0,5
Hendrik W. Joensen - Mannbjørn Anths 1-0

3. deild vestur

MT-ST 4-0
Eyðun Samuelsen - Rógvi Jacobsen 1-0
Allan Eldevig - Gutti Petersen 1-0
Hans A. Ellefsen - Rani Hansen 1-0
Ingi W. Joensen - Torkil Petersen 1-0

VT-HT4: 0-4

Unglingar

KTFa-KTFb 3,5 — 0,5
Rógvi Dragaberg - Bogi Hansen 1-0
Herborg Hansen - Eilif Arge 1-0
Danny Baldvinsson - Regin Sivertsen 0,5-0,5
Berit Kalsø - Dánjal P. Jacobsen 1-0

GTa-GTb 2-2
Per Jacobsen - Andras Mikkelsen 0-1
Heri Thomsen - Finnur Justinussen 1-0
Sam Jacobsen - Ottar Olsen 1-0
Hávarður Olsen - Frank A Guttesen 0-1

Føroya Óðalsfelag

Aðalsfundur felagsins verður

Sunnudagin 24. november kl. 15:00

á búnaðardeplinum í Kollafirði.

Skrá sambært lógunum.

Síðani greiðir formaðurin frá um lógaruppskotini hjá felagnum:
- um at broyta matrikullógina
- um at selja smáu festini
- um at selja leigutraðir

At enda verður orðaskifti um skipan og lógir felagsins í framtíðini.

Stýrið

Óðalsfelagið er felag fyri tey, ið eiga jørð – ella ynskja at eiga jørð – og virkar fyri betri umstøðum hjá teimum, ið fáast við smábrúk og varveita føroyska óðalsmentan.

Stýrið í Óðalsfelagnum:

Norðoyar: Jógvan í Beiti í Klaksvík
Eysturoy: Ditlev Róin í Fuglafirði
Streymoy: Niels Th. Pedersen í Vestmanna
Vágar: Jóannes Niclasen í Miðvági
Sandoy: Bødvar Poulsen í Dali
Suðuroy: Mikkjal Sørensen í Porkeri
Formaður: Kári á Rógvi á Argjum

FTV-Bókhald

Vit átaka okkum

- Bókhald
- Roknskap
- Skattauppgerð

Eisini hava vit sølu av skrivstovuútgerð.

FTV-Bókhald
900 Vágur
Tlf. 37 41 05 · Fartlf. 22 56 03 · Fax 37 41 07
T-post: ftvb@post.olivant.fo

Porkeris kvøldskúli

Treytað av nóg stórari luttøku verður frálæra í tekning við einum ella fleiri litum.

Frálæran verður í 4 vikuskiftum, 2 áðrenn og 2 aftan á jól.

Tilmelding hjá læraranum Hans Jørgen Remmer tlf. 373587. Luttøkugjaldið verður 150 kr.

Porkeris Kvøldskúli · Tlf. 373 185

Toyota hiace 4 x 4

Vøruvognur el-rútar/spegl, hita í setrunum, rút í høgru dragihurð, sleipikrók og onnur eykaútgerð. Nýggj kavadekk. Sera vælhildin. Til sølu fyri kr. 144.000 + mvg, v/ mvg 180.000 kr.

Tlf. 218484

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

Nissan Almera 2,0 Diesel GX
grønur, 5 hurðar,
árg. 1996.
89.000

Nissan Primera 1,6 A/C
reyður, 4 hurðar,
árg. 1998, 70.000 km.
125.000

Nissan Primera 2,0
reyður, 4 hurðar,
árg. 1991, 121.000 km.
59.000

Peugeot 306 DT 1,9 AC
bláur, 4 hurðar,
árg. 1999, 61.000 km.
125.000

Peugeot 306 DT 1,9
bláur, 4 hurðar,
árg. 1997, 150.000 km.
90.000

Peugeot 307 SW 2,0 Hdi
gráur, 5 hurðar,
árg. 2002, 2.000 km.
239.000

Peugeot 406 ST 2,0 Hdi
vínreyður, 4 hurðar,
árg. 1999, 120.000 km.
164.000

Opel Astra 1,7 DT
brúnur, 4 hurðar,
árg. 1996.
75.000

Opel Astra 1,6 Club Station Car
reyður, 5 hurðar,
árg. 1996, 98.000 km.
70.000

Opel Astra 1,7 DT Van
bláur, 5 hurðar,
árg. 1998, 82.000 km.
78.000

Opel Astra 2,0 DT
grønur, 5 hurðar,
árg. 2001, 38.000 km.
175.000

Opel Vectra 1,8
svartur, 4 hurðar,
árg. 1996, 80.000 km.
122.000

Opel Astra 1,7 Diesel
reyður, 4 hurðar,
árg. 1995, 118.000 km.
76.000

Opel Omega 2,0i
gráur, 4 hurðar,
árg. 1989, 121.000 km.
22.000

Ford Courier 1,8 Diesel Van
hvítur, 3 hurðar,
78.000

Ford Escort 1,6 Van
reyður, 5 hurðar,
árg. 1996
65.000

Ford Escort 1,8 Diesel Van
bláur, 3 hurðar,
árg. 1995, 150.000 km.
45.000

Ford Escort 1,8 Diesel
grønur, 4 hurðar,
árg. 1995, 152.000 km.
65.000

NISSAN NISSAN

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir

Bilarnir finnast eisini á:
www.nissan.fo

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin

Bókhald/Skrivstova

Søkt verður eftir einum fólki til skrivstovu okkara á Toftum at byrja skjótast til ber.

Uppgávur:
Arbeiði verður fjølbroytt og kemur at fevna um kundarøkt, bókhald og annað skrivstovuarbeiði.

Førleikakrøv:
Umsøkjarar við útbúgving innan handil, bókhald og/ella skrivstovu hava fyrimun. Royndir við teldum, datagrunnum, bókhaldsskipanum og skrivstovuarbeiði geva somuleiðis fyrimun. Álit, nærlagni, góð samstarvsevni og arbeiðsemi verða sett í hásæti.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Kassamiðstøðina og spyrja eftir Kára.

Umsóknir skulu vera Kassamiðstøðini í hendi innan mánaðarskiftið. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Kassamiðstøðin P/F er eitt 7 ára gamalt partafelag, ið veitir tænastur til fiskivinnuna. Vit hava í miðal 7 ársverk umframt undirveitarar. Kassamiðstøðin hevur 5 goymslur kring landið við høvuðsgoymslu og skrivstovu á Toftum. Á skrivstovuni arbeiða vit við Navision Atain bókhald/skrásetingarskipan, HeimaBanka og MS Office skrivstovuskipan.

KASSAMIÐSTØÐIN
FO-650 Toftir
Faroe Islands
Tel. +298 44 99 50
Fax +298 44 99 53

SKIPASMIÐJAN

P/F Tórshavnar Skipasmiðja
Tel: 31 11 55 · Fax: 31 11 25
P/F Skipasmiðjan á Skála
Tel: 44 11 55 · Fax: 44 11 25
24 tíma Vakt
tel: 21 11 55

www.faroeyard.fo · E-mail: sale@faroeyard.fo